Fylgiskjal 3

LM-078/2023

Arbeiðs- og brunaeftirlitið
FAROESE SAFETY AUTHORITY

Fíggjarmálaráðið
Postbox 2039
Tinganes
110 Tórshavn
Føroyar

Tórshavn, hin 7. februar 2024
Málnr.: 24/01873-2
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: MK

Viðvíkjandi: Hoyringarsvar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Virkisskrá

Arbeiðs- og brunaeftirlitið skal við hesum geva sítt hoyringarsvar til uppskot um broyting í løgtingslóg um Virkisskrá.

Sum almennur eftirlitsmyndugleiki tekur Arbeiðs- og bruneftirlitið undir við, at tað verða knýttar nýggjar grunddátur í Virkisskránna. Atgongdin til grunddáturnar hevur jaligan týdning fyri virksemi hjá myndugleikanum í sambandi við at leggja eftirlitsvitjanir til rættis, menning av fakskipanum hjá myndugleikanum, samankoyring av dáta og at gera metingar á sama støði sum hinir norðurlendsku myndugleikarnir.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið skal tí mæla til, at uppskotið verður samtykt.

Vinarliga

Marin Karlsdóttir

Marin Karlsdóttir
Fulltrúi